# Guðrun fær nógv rós

**Á heimasíðuni hjá DR fær Guðrun rós um háls og herðar bæði frá dønum og føroyingum. Tað ber til at senda eina heilsan til Guðruna á síðuni, og eru tað longu yvir 1100 fólk, ið hava nýtt henda møguleikan**

STJØRNA
*Ingrid Bjarnastein*




*Á heimasíðuni hjá »Stjerne for en aften« ber til at senda eina heilsu til luttakararnar. Í gestabókini hjá Guðruni eru longu yvir 1100 heilsanir komnar, og er tað nógv tað mesta higartil*

Um góðar tvær vikur verður Guðrun Sólja Jacobsen at síggja í Forum í Keypmannahavn, har hon, sum øll longu vita, skal vera við í finaluni í donsku sjónvarpssendingini »Stjerne for en aften« hjá DR.

Luttakararnir í sendingini eru allir at finna á heimasíðuni hjá DR, og harímillum er sjálvsagt eisini Guðrun.

## Nógv flest

Av teimum, sum longu eru komin í finaluni og tey, ið hava møguleika fyri at ogna sær eitt finalupláss í morgin, hevur Guðrun fingið nógv flestar heilsanir. Hetta kundi bent á, at Guðrun uttan iva er ein av favorittunum til at vinna kappingina.

Tann, ið hevur fingið næstflestar heilsanir er Tarek Sidki, sum verður við í fjórðingsfinaluni fríggjakvøldið. Men hann var fyrrapartin mikudagin, ikki komin upp á 1000 heilsanir, og tá lá Guðrun á yvir 1100 heilsanum. Tarek Sidki er uttan iva eisini ein av favorittunum til finaluna.

Heilsanirnar til Guðruna eru úr Føroyum og Danmark, men okkurt heilsanin var enntá eisini úr Grønlandi.

Fólkini, ið hava skrivað, eru ógvuliga positiv, og ynskja Guðruni góða eydnu í finaluni, og fortelja henni, hvussu vakurt hon syngur.

Allar heilsanirnar til Guðruna benda á, at hon hevur ikki bert sungið seg inn í hjørtuni á føroyingum, men so avgjørt eisini inn í hjørtuni á mongum dana.

»Hej Gudrun! Du er den bedste - hvis du ikke vinder finalen, er jeg sikker på at der venter dig noget stort - du har det i dig til at blive en diva. Bare klø på. Tommy - Mar 25, 2003 14:17:15«

Fleiri heilsanir siga eisini, hvussu rørd fólk eru blivin, tá Guðrun hevur sungið, og fær hon í stuttum rós um háls og herðar frá øllum.

## Promise me

Tey flestu, ið hava sent heilsanir inn síðani Guðrun var í fjóðringsfinaluni fríggjakvøldið, eru á einum máli um, at Guðrun skal syngja »Promise Me« til finaluni. Hetta er tó ikki tí hon ikki megnaði væl at syngja »Hero«, tvørturímóti. Fleiri nevna, at Guðrun sang sangin nógv betri enn sangarinnan, ið hevur gjørt hann kendan, Mariah Carey. Tey halda bara, at »Promise me« hóskar seg betri til hennara.

Tann stóra finalan verður í Forum tann 4. apríl, og nú fríggjadagin verður greitt, hvørjum øðrum Guðrun skal kappast ímóti.

Frá Føroya Tele verður upplýst, at tey av øllum alvi arbeiða við, at føroyingar eisini skulu fáa møguleika at atkvøða til finaluna. Tó var tað soleiðis, at fleiri fingu sms-boðini aftur, tí kapasiteturin var ov lítil, men hesum verður eisini arbeitt við. Føroya Tele veit fyrst í komandi viku at siga frá, hvussu verður við finaluni frá teirra síðu.

### Fakta

Guðrun Sólja Jacobsen skal í øllum førum kappast ímóti:

Jacob Sveistrup
Martin Pedersen

Í aðru fjórðingsfinalu í annaðkvøld verða:

Tarek Sidki – Rock With You
Kendra Lohman – Sexual Healing
Morten Steen – Get the Fuck out of my Head
Jacob Andersen – With a Little Help From my Friends
Karen Marie Groth – Feel Like Making Love
Ea & Martin – Sometimes Love Just Ain´t Enough

Finalan verður tann 4. mai í Forum í Keypmannahavn

Forum tekur 5000 áskoðarar

Atgongumerki eru til keyps á www.e-billetter.dk



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Sune á ting

Týsdagin tók Sune Jacobsen í Sørvági sæti á tingi fyri Marjus Dam, løgtingsmann, sum hevur biðið um farloyvi fram til 4. apríl.

Næsti maður á sambandslistanum í Vágum er tó Gunnar K. Nattestad, men av tí at hann ikki býr í Føroyum, kann hann ikki taka sæti tingi, tískil tók Sune Jacobsen sum triði maður á listanum sætið.

Á valinum tann 30. apríl í 2002 fekk Marjus Dam 311 atkvøður, Gunnar K. Nattestad fekk 143, meðan Sune Jacobsen fekk 122.

Sune Jacobsen, sum er 51 ára gamal, lærarai í Sørvági, er annars kendur úr politikki. Hann varð valdur á ting í 1988 og sat til løgtingsvalið í 1990. Hann tók aftur sæti á tingi í 1994, tá Ivan Johansen, løgtingsmaður, varð valdur landsstýrismaður.

Sune Jacobsen tók prógv á Føroya Læraraskúla í 1976 og hevur starvast sum lærari í Sørvági síðani.



Hann er sonur Innu f. Hansen úr Skopun og Evald Jacobsen úr Sørvági. Hann er giftur Vivi Jacobsen.

## Osvald Schiller Johansson 40 ár

Hósdagin 27. mars fyllir Osvald Schiller Johansson, vanliga nevndur Ossi, 40 ár. Osvald er føddur og uppvaksin í Rabarbukvarterinum í Havn. Sum ungur sigldi hann eina tíð. Í mong ár arbeiddi hann sum bilførari hjá fleiri flutningsfyritøkum í Havn. Hann er útbúgvin sløkkiliðsmaður og kavari. Hann hevur arbeitt sum sløkkiliðsmaður hjá Tórshavnar Sløkkiliði síðan 1990 og í føstum starvi síðan 1996. Saman við Malenu Klemmentsen eigur Osvald dóttrina Lív, sum er næstan tvey ára gomul. Osvald er kanska betur kendur undir navninum Osvald Jacobsen, men herfyri fekk hann navnabroyting til Osvald Schiller Johansson – eftir abbanum við sama navni, vanliga nevndur Svenskarin, ið búði í barnaheiminum hjá Osvaldi í Sjúrðargøtu.



## Jóannes Leivsgarð úr starvi

Fríggjadagin 21. mars hevði Jóannes Leivsgarð sín seinasta starvsdag á telefonstøðini í Klaksvík, har hann hevur starvast í góð 32 ár.

Jóannes er sonur Ellu og Jaspur Leivsgarð. Hann er giftur Siggu Sofíu Vesturdal av Eiði, og eiga tey synirnar, Jaspur, Pól og Egil.

**rs**




## Silvurbrúdleyp

Í dag, 27. mars, hava Annika og Janus Midjord, Fuglafirði, silvurbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

Í dag, 27. mars, hava Sunnuvá og Heri Jacobsen, Klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin á Hotel Norð á Viðareiði leygardagin 29. mars kl. 19.00.

## Dagurin

27. mars. Kastor. Tær gomlu søgurnar nevna fleiri annars ókend halgimenni, sum itu Kastor og vórðu tikin av døgum 27. og 28. mars

## Hans Jacob á Brúnni 75 ár

20. mars fyllti Hans Jacob Hansen í Fuglafirði 75 ár. Fuglafjørður hevur verið vælsignaður við nógvum kveikjarum,sum hava ríkað mentunarlívið í bygdini, og er Hans ein teirra. Hugsaði at skriva eitt sindur um hendan táttin í lívinum hjá Hansi, sum eina heilsan á føðingardegnum.

Longu sum smádrongur byrjaði Hans saman við javnaldrum at spæla sjónleik, fyrst í kjallaranum hjá Steingrím Samuelsen, síðan í dansistovuni, og tá ið Fuglafjarðar Sjónleikarafelag varð stovnað var hann ein av stigtakarunum. Fyrsti sjónleikurin, sum sjónleikarafelagið stóð fyri var Hjá dalabóndum. Her spældi Hans nikur, og tað skuldi hann gera so livandi, at tríggjar leirvíkskonur svímaðu. Minniligasta avrikið hjá Hansi sum sjónleikari man ivaleyst vera leikluturin sum Tormóður í filminum Barbara. Rættuliga tíðliga fór sjónleikarafelagið at arbeiða fyri at fáa nýtt sjónleikarhús í bygdini, og eingin man vera glaðari enn Hans fyri, at hesin dreymur enduliga er verðunleiki, hann hevur skrivað ikki minni enn tríggjar sangir til nýggja húsið.

Hans fór eisini tíðliga at royna seg sum listamálara, og var hann fyrsti fuglfirðingur, sum hevði málningaframsýning í Havn. Saman við Frits Johannesen og øðrum tók hann eisini stig til fyrstu Varmakelduframsýningina fyri um 30 árum síðan og hevur framsýmingin verið fastur táttur á Varmakeldustevnuni síðan tá. Nevnast kann eisini, at tað vóru døturnar hjá Hansi, sum byrjaðu skeiðið hjá Fuglafjarðar kvøldskúla í málningalist, sum nú er vorðið ein institutión, og at tað millum onnur eru fólk haðani, sum hava tikið stig til framsýningarhølið í Ribarhúsi.

Hans hevur verið í hornorkestrinum, síðan fuglfirðingar byrjaðu at spæla horn og til hann noyddist at gevast, tí eyguni fóru at bila, og hann sá ikki nótarnar longur. Í einum sangi, sum hann saman við bróðrinum Jógvan Edvard yrkti til fyrstu manningina í hornorkestrinum -eitt ørindi til hvønn spælaran-, lýsa teir í síðsta versi eina hending, har Hans situr við tubuni og venur tá íð grannakonan kemur brestandi inn.



*Seinast kom við tubuni*
*Son Hans Jacob á Brúnni;*
*Tá spurdi Frida, kona Ola:*
*Hvat man feila kúnni?*

Haldi sjálvur at hetta lýsir væl Hans; hann hevur dámað væl at framført og hevur ongantíð sett sítt ljós undir skeppumálið, men hinvegin hevur hann heldur ongantíð veri sjálvhátíðarligur, heldur hevur hann altíð havt skálkin aftan fyri oyra.

At gerast nærum blindur man vera ein smeitur, sum tekur mótið frá teimum flestu; men ikki frá Hansi. Hann fekk sær fatur á einum hjálpitóli, einari teldu, sum kundi vaksa so miki um bókstavirnar, at hann sá teir, og sum tann opni og bjartsjygdi persónurin, hann er, dugdi hann at síggja møgulleikarnar í hesum nýggja tóli og byrjaði at skriva. Úrslitið av hesum er millum annað yrkinga- og stuttsøgusavnið Á Brúnni.

Sum ungur var Hans til lands í Íslandi, og har lærdi hann millum annað at spæla á harmoniku; hann fekk eisini fatur á einum harmonikuskúla, men fekk tó ikki so nógv burtur úr honum tá. Nú, aftur ímóti , hann hevði spælt horn í eitt mannaminni, og tískil læs nótarnar raði, bar betur til. Hann fór tí at leggja seg meira eftir harmonikuni, harafturat umsetti hann harmonikuskúlan til føroyskt, og eitt skifti hevði hann brævskúla í harmonikuspæli. Munnu ikki tær harmonikuvenjingarnar, sum nú plaga at vera í hølunum hjá hornorkestrinum sunnudagar undir leiðslu av Óla Johannesen, hava fingið íblástur frá brævskúlatiltakinum hjá Hansi? Hans man hava verið við til flestu tiltøk her á landi, har harmonikuspælarar møtast. Í fleiri ár var hann eisini við í Fólkatónleikarstevnuni, oftast við egnum løgum og tekstum, og síðstu árini hevur hann verið við til at sungið kingo, millum annað á mentunarstevnuni hjá Norðurlandahúsinum.

Síðsta hálva árið hevur Hans verið álvarsliga sjúkur.

Hjartaliga tillukku við degnum

**Niels**